

*Prestar, politikarar og kirkjufólk í Havnar kirkju ólavsøkumorgun*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Lad os f. eks. forestille os, at dronning Margrethe var til gudstjeneste her i kirken i dag. Måske ville hun så sidde i en særlig stol skjult for jer i kirken, men alene bevidstheden om hendes tilstedeværelse ville afgjort kaste glans over gudstjenesten. Dronningens herlighed smitter af og stråler ud i rumme som omfatter os, der er til stede. Således er også Guds herlighed. Hans herlighed kaster glans over jorden - ja over gudstjenesten.

Men er man ikke bevidst om hans tilstedeværelse, har man heller ikke øje for hans herlighed.

Guds herliggørelse betyder ikke, at menneskets guddommeliggørelse, ligeså lidt som en kongelig tjener bliver konge af at færdes i kongens nærhed. Men kongens glans smitter alligevel af på tjeneren, der så kan smykke sig med titlen 'kammerherre' el.lign. Sådan med herliggørelse: det er herrens herlighed, der så at sige smitter af.

Eksempel er også både organisten og kirkens dejlige korsangere med dirigenten. Selv om både orgel og koret står oppe på pulpituret bag de fleste, så kan vi høre dem, vi ved, de er der. Det afspejler også Guds herlighed. For uden musik og uden korsang, så ville der mangle noget til denne festlige gudstjeneste.

I dagens tekst bliver Jesus og med ham alle, der vil, herliggjort. Først dø, siden opstå i mangfoldighed. Umiddelbart kan det ligne en fornedrelse og et nederlag, at Jesus dør. Døden ligner ikke en herliggørelse.

Men døden bliver herliggjort ved opstandelsen fra de døde, og hvis ingen opstandelse der var, ja - så var vores tro simpelt hen forgæves.

Den herliggjorte Jesus har ikke noget at gøre med et ophøjet menneske i almindelig forstand. Herliggørelsen sker så at sige på et højere plan. Billedet om hvedekornet illustrerer Guds herlighed. Hvedekornet herliggøres i processen: såning, spiring og frugtsætning.

Hvedekornet, der er gået til i processen, kan man ikke se længere, det lever videre i en anden skikkelse, og denne skikkelse kendes ikke længere som det oprindelige hvedekorn.

Jesu død er at sammenligne med en såning og hans opstandelse med frugtsætningen.

Selvfølgelig kunne det lade sig gøre for grækerne i dagens tekst at se Jesus. Men bag spørgsmålet om at få lov til at se Jesus var ønsket at måtte se Jesus som Guds søn.

Men et sådant syn er en hemmelighed, der kræver åbenbaring, - så Helligånden lader det synliggøre for troen.

I billedet om hvedekornet uddrager Jesus moralen, at: "Den, der elsker sit liv, mister det, og den, der hader sit liv i denne verden, skal bevare det til evigt liv."

Kristendommen er på ingen måde livsfornægtende- og verdensforsagende . Det sande kristenliv består ikke i at fornægte sit jordiske liv og regne det for syndigt. Et sådant syn fik de kirkehistoriske konsekvenser, vi kender i munkelivet.

Men Jesus siger ikke, vi skal hade livet, men hade 'sit liv'.

Og det er ganske godt illustreret med teksten om hvedekornet, der illustrerer dette særdeles fremragende.

Hvis et sådant hvedekorn kunne elske sit liv, ville det betyde, at det nægtede at lade sig så og hvis det alligevel lykkedes at putte det ned i jorden, ville det nægte at spire, fordi det netop kun elskede sit liv som hvedekorn.

Når hvedekornet elsker livet, opgiver det gerne sit liv, for at nyt og mere mangfoldigt liv kan spire frem.

Det kan således ses helt tydeligt, at hvedekornet er et billede på Jesus. Havde Jesus elsket sit liv, havde han aldrig givet sig hen til sine fjender, men stædigt kæmpet for at beskytte det.

Det ville sikkert have indebåret, at han nedtonede sin rolle som Guds søn, for udtalelserne om dette gav lige præcis næring til dødsdommen.

Han ville heller ikke have ofret al den tid på syndere og fortabte

Hvis Jesus havde elsket sit liv, så ville han ikke have været Kristus. Og hvis han var blevet henrettet alligevel, havde det ikke gjort nogen forskel for os. For så havde såningen af hans legeme ikke medført nyt liv.

Men fordi Jesus elskede livet og var parat til at sætte sit eget liv på spil for dette langt mere overordnede princip, kunne Kristi liv fortsætte efter hans død.

Det er i dette perspektiv vi skal se billedet om hvedekornet, der elsker livet og derfor er villig til at opgive sig selv for, at livet kan fortsætte.

Jesus proklamerer, at det at tjene ham er at følge ham. Hvor Jesus selv er, dér skal også hans tjener være". Herved proklamerer han også, at både vort liv og vor død er forbundet med Hans liv og død.

Paulus siger det enkelt og lige til, at alle vi, som er blevet døbt til Kristus Jesus, er døbt til hans død. Vi blev altså begravet sammen med ham ved dåben til døden, for at også vi, sådan som Kristus blev oprejst fra de døde ved Faderens herlighed, skal leve et nyt liv (Romerbrevet kap. 6).

I et sådant fællesskab med Kristus, hvor livet tages af Guds hånd - som Jesu liv - her har døden ikke for alvor magt.

Kristus opstod, - og på samme måde skal også vi opstå og fortsætte det fællesskab, der begyndtes ved dåben. Og da vil vi i sandhed skue Guds herlighed og se, at det er samme herlighed, vi har kunnet ane på denne side af døden. Amen.



# Fátækar møður selja síni pinkubørn

**Barnleys hjún í Vesturevropa gjalda ímillum 40.000 og 150.000 krónur fyri eitt pinkubarn úr Bulgaria, men tað eru ikki møðurnar, sum fáa pengarnar**

BARNAHANDIL

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Herfyri avdúkaðu fronsku myndugleikarnir, at fleiri kvinnur úr Bulgaria høvdu selt síni pinkubørn til barnleys hjún í Fraklandi og aðrastaðni í Vesturevropa, og í síðstu viku avdúkaði italska løgreglan tað sama har. Kanningarnar vístu, at kvinnurnar vóru komnar úr Bulgaria til Italia at eiga børnini, men at tey alt fyri eitt vórðu latin hjúnunum, sum høvdu keypt tey.

Bulgarska blaðið Sofia Morning News skrivaði hósdagin, at nógvar av kvinnunum, sum selja síni børn, eru fátækar, og at skipaðir brotsmannabólkar noyða tær at selja børnini. Sambært blaðnum fáa brotsmenninir vanliga einar 150.000 krónur fyri eitt dreingjabarn, meðan gentubørn fara fyri einar 40.000 krónur.

Men møðurnar fáa bara ein lítlan part av pengunum. Nógv tað mesta fer í lummarnar hjá brotsmonnunum, skrivar Sofia Morning News.

Myndugleikarnir í fleiri londum hava í seinastuni hert tiltøkini, sum skulu forða fyri slíkum handli við børnum. Umframt avdúkingarnar í Fraklandi og Italia hava myndugleikarnir í Kina avdúkað, at fleiri foreldur har hava selt síni børn, og at tey síðani eru smuglað av landinum.

# 59 ár síðani Hiroshima



*Í gjár savnaðust fleiri túsund fólk við minnisvarðan í japanska býnum Hiroshima at minnast tey mongu, sum doyðu, tá amerikanararnir tveittu eina kjarnorkubumbu niður yvir býin tann 6. august í 1945. Aftan á røður og bønarhald vórðu fleiri hundrað friðardúgvur sleptar á flog*

# Vesturafrika í neyð av grashoppum

**Fleiri lond har vesturi í Afrika eru komin í neyð, eftir at grashoppur í stórum tali hava gjørt innrás**

GRASHOPPUR

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Grashoppuinnrásin er tann ringasta í 15 ár. Teir seinastu dagarnar hava grashoppur í stórum tali herjað Algeria, Mali, Senegal, Niger, Gambia og Mauritania, har tær hava oyðilagt at kalla alla grøðina.

Ringast stendur til í Mauritania. Myndugleikarnir har siga, at teimum tørvar minst 15 flogfør og 640.000 litrar av evnum, sum kunnu gera av við grashoppurnar. Frakland hevur sent fleiri serfrøðingar til Mauritania og hini londini, og ES hevur játtað 15 milliónir krónur til arbeiðið ímóti grashoppunum.

Í seinastuni hava grashoppurnar eisini gjørt um seg í Tjad, og hjálparfelagsskapir bera ótta fyri, at tær eisini fara at herja flóttafólkalegurnar í sudanska landspartinum Darfur.

## Gassið flytast við skipum

Upprunaliga ætlaði norska stjórnin, at gass frá oljuleiðunum skuldi flytast í land við rørleiðingum, men teirri ætlanini hevur stjórnin nú slept.

Torhild Widvey, olju- og orkumálaráðharri, sigur við norska útvarpið, at gassið skal flytast í land við skipum. Hon sigur, at stjórnin ætlar at fáa norðmenn at brúka meiri gass, men at útrokningar hava víst, at tað er ikki fíggjarliga lønandi at leiða gassið upp á land við rørleiðingum. Hon sigur kortini, at hetta kanska verður lønandi seinni.

Tíðindini um, at gassið skal flytast í land við skipum, hava fingið ringa móttøku í norska ídnaðinum. Serliga ídnaðarvirkir í Norðurnoregi eru misnøgd, tí tey høvdu vónað at fáa nógv arbeiði burtur úr teimum ætlaðu rørleiðingunum, sigur NRK.

## Sleppur helst ikki til OL

ES umhugsar at nokta hvítarussiska ítróttarráðharranum innferðarloyvi til Grikkalands í sambandi við teir olympisku summarleikirnar, sum byrja um eina viku í Athen.

Juri Sivakov, ítróttarráðharri, er fyrrverandi generalur í hvítarussiska herinum, men varð fyri stuttum tilnevndur ráðharri. ES hevur illgruna um, at hann var uppií, tá fýra politiskir andstøðingar í Hvítarusslandi brádliga hvurvu, og samveldið hevur júst biðið hvítarussisku myndugleikarnar kanna, um hetta er so. Sivakov var innanríkisráðharri, tá ein fyrrverandi ráðharri, ein fyrrverandi tingmaður, ein handilsmaður og ein sjónvarpsmaður hvurvu. Tað er alment kent, at teir fýra vóru mótstøðumenn hjá tí umstrídda forsetanum, Aleksander Lukasjenko.

Talsmaðurin hjá grikska uttanríkisráðnum segði hósdagin, at øll ES-londini eru samd um, at Jiri Sivakov eigur ikki at fáa innferðarloyvi til Grikkalands. Hann legði afturat, at griksku myndugleikarnir fara helst at gera eftir viljanum hjá samveldinum.

## Dýrt at seta búgv

Tað gerst altsamt dýrari at seta búgv í Oslo og hinum stóru býunum í Noregi. Tey seinastu tølini vísa, at íbúðarprísurin í hækkaði hálvt annað prosent í apríl-ársfjórðingi, og at húsaprísurin hækkaði trý prosent. Tað merkir, at samanborið við seinasta summar eru prísirnir hækkaðir umleið 10 prosent, skrivar Aftenposten.

Tøl hjá norsku hagstovuni vísa, at prísurin er hækkaður meiri í Bergen, Stavanger og Tróndheimi enn í Oslo. Í teimum trium býunum er prísurin á húsum og íbúðum hækkaður 15,4 prosent í meðal tað seinasta árið, og at prísurin í høvuðsstaðarøkinum er hækkaður 11 prosent.

Hyggja vit longri aftur, er prísurin hækkaður uppaftur meiri. Aftenposten skrivar, at samanborið við prísirnar fyri fýra árum síðani kosta eini hús í Bergen, Stavanger og Tróndheimi 22 prosent meiri nú enn tá. Í hesum sama tíðarskeiðinum er prísurin í Oslo hækkaður heili 45 prosent. Sum dømi nevnir blaðið, at í dag kostar ein íbúð í Oslo 27.000 krónur fyri hvønn fermetur.

## Rændu bil og borgarstjóra

Nakrir tjóvar í russiska oljubýnum Tyumen stjólu nú um dagarnar ein bil av tí dýrara slagnum.

Tað vísti seg kortini, at eigarin var í bilinum, og at tað var sjálvur borgarstjórin, sum átti bilin. Tjóvarnir góvu borgarstjóranum boð um at seta seg afturum, og síðani settu teir ferð á út úr býnum. Sambært útvarpinum Ekho Moskva kendu tjóvarnir ikki mannin, men tá teir eina løtu seinni skiltu, hvør hann var, settu teir hann av, áðrenn teir hildu leiðina fram.

Tey flestu í Tyumen, sum hava ábyrgdarstarv, hava vanliga vaktarmenn ella lívverjar, men tað hevði borgarstjórin ikki. Ekho Moskva sigur, at aftan á ránið er hann kortini farin at umhugsa at fáa sær vaktarmenn.